# Fisher semingsmaður?

Tingmanningin hjá íslendska flokkinum Hreyfingin eru ímóti, at ein semingsmaður úr einum Norðurlandi fær litið upp í hendi at royna semju í Icesave-málinum. Tað er ikki óhugsandi, at ísloendingar fara at royna at fáa eina aðra semju við bretar og niðurlendingar, og stjórnin eisini hevur tosað við andstøðuna um spurningin fyri at vita, um tað ber til at fáa eina breiða semju um, hvussu farast skal fram. Fréttablaðið skrivar, at tað verður umhugsað at fáa ein óheftan semingsmann. Millum teirra, sum verða nevndir, er fyrrverandi týski uttanríkisráðharrin Joschka Fischer.



# Koyr »Bládýpið« út á ke

**Hóast altjóða listaheimurin metir »Bládýpið« hjá Tróndi Patursson sum ein listarligan dýrgrip, vil Føroya Listasavn ikki vita av verkinum, sum nú er stongt.**
**– Koyr »Bládýpið« út á keiina, har tað hóskar betur millum allar hinar bingjurnar, sigur leiðarin á Listasavninum, Helgi Fossadal**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*– Eg lati ikki verkið upp, sigur Helgi Fossadal, leiðari á listasavninum, sum ikki heldur, at listaverkið »Bládýpið« hoyrir heima á Listasavninum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Verkið er største attraktiónin á Randers Kunstmuseum; á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn er hetta tað fyrsta, gestirnir møta. Og í gjár kom fyrispurningur úr Hollandi um at lána verkið til listarligu heimsframsýningina í 2011. Talan er um listaverkið »Bládýpið« hjá Tróndi Patursson, sum eisini er at finna uttan fyri okkara egna tjóðarsavn, Føroya Listasavn.

Men her heima vil leiðarin á listasavninum ikki lova gestunum at uppliva høgt metta listaverkið.

Tað fingu vit staðfest, tá vit herfyri ætlaðu at vitja »Bládýpið« uppi á Føroya Listasavni. Hurðin inn til verkið var stongd, og í móttøkuni bar heldur ikki til at fáa útflýggjað ein lykil.

Og eftir øllum at døma eru vit ikki tey einastu, sum eru komin á stongdar dyr í føroysku útgávuni av sermerkta listaverkinum. Sambært listamanninum Tróndi Patursson ringja ferðafólk, skúlaflokkar og onnur javnan til hansara og spyrja, hvussu tey kunnu sleppa inn í »Bládýpið«, tí eisini tey hava fingið noktandi svar, tá tey hava spurt á Føroya Listasavni.

### »Eg lati hana ikki upp«

Og listamaðurin stendur líka spyrjandi, sum útistongdu og undrandi gestirnir.

– Eg havi latið Føroya Listasavnið verkið sum gávu og handað leiðaranum Helga Fossadal, lyklarnar til tað. Har fylgir eisini ein kontrakt við, sum sigur, at gestir á Listasavninum skulu hava atgongd til verkið, sigur Tróndur Patursson, sum ikki skilur, hvat gongur fyri seg.

Sjálvur er hann eina ferð sloppin at lána lyklarnar aftur frá leiðaranum , tá eitt útlendskt listafólk, sum sýndi fram á Listasavninum, ynskti at síggja verkið, men annars ber ikki til at sleppa framat lyklunum hjá leiðaranum.

– Eg lati hana ikki upp, er greiða svarið, vit fáa frá Helga Fossadal, sum eisini vil vera við, at ongin slík kontrakt um atgongd til »Bládýpið« er til.

– Tað er ikki rætt. Eg havi eitt kopi av kontraktini og tað hevur stýrið fyri Listasavnið eisini, sigur Tróndur Patursson, sum er burturstaddur í løtuni.

Kontrakt ella ikki, so minnir Helgi Fossadal á, at tað ikki er heilt vandaleyst at lata fólk ganga inn og út úr eini bingju úr glasi, og tí kann hon ikki standa opin uttan eftirlit. At útflýggja gestum ein lykil, metir hann heldur ikki vera eina brúkiliga loysn, hóast hetta er ein skipan, sum riggar væl við »Bládýpinum« á til dømis Bryggjuni í Keypmannahavn.

– Hatta er ein bingja, og tað er ikki bara sum at siga tað, at fáa lásið upp. Vit hava heldur ikki pláss fyri henni og vilja ikki hava ábyrgdina av henni, sigur Helgi Fossadal,

*Vildi tú ynskt, at tit høvdu pláss fyri henni?*

– Eg haldi hon skuldi verið koyrd út á keiina, har hon hevði hóskað betri millum aðrar bingjur, sigur leiðarin á listasavninum, sum ikki rættiliga vil fyrihalda seg til, at »Bládýpið« er eitt listaverk og ikki bara ein bingja.

### Stórfingið høvuðsverk

Tað hevur leiðarin á Randers Kunstmuseum, hinvegin eina rættiliga greiða meining.

– »Bládýpið« er ikki ein bingja, men eitt ótrúligt listaverk og uttan iva høvuðsverkið hjá Tróndi Patursyni, sigur Finn Terman Frederiksen, leiðari á Randers Kunstmuseum, sum eisini er listfrøðingur, umframt at hann hevur skrivað eina bók um listina hjá Trónda Patursson.

Á listasavninum í Randers hava tey nevniliga eisini eina útgávu av »Bládýpinum« av júst sama slag, sum tann á Føroya Listasavni – also í skapi av eini bingju. Har hava tey hinvegin gjørt pláss fyri verkinum inni á listasavninum, tí leiðarin er ikki í iva um, at tað er har, tað hoyrir heima.

– Vit hava prioriterað hetta týðandi listaverkið sera høgt, og tað hoyrir í allar størsta mun heima á einum listasavni. Tað hevur best av at standa innandura, og tí hava vit eisini skapað neyðugt pláss fyri tí, sigur leiðarin á Randers Kunstmuseum og leggur afturat, at »Bládýpið« er uttan samanbering størsta listarliga attraktiónin hjá listasavninum í Randers.

– Eg skal ikki blanda meg uppí, hvat tit gera í Føroyum. Men skal eg koma við einum góðum kollegialum ráði til leiðaran á Føroya Listasavni, so er tað at skapa pláss fyri verkinum

## Millum Himmal og Helviti

Soleiðis lýsir Finn Terman Frederiksen, listfrøðingur, listaverkið »Bládýpið«, sum eisni verður nevnt »Kosmiska rúmið«

- Installatiónin »Kosmiska rúmið« setur orienteringsevni hjá teimum, sum koma inn, á eina harða roynd. Veggirnir, sum eru upplýstir útifrá, eru glasmálningar, meðan gólv og loft eru spegl. Upplivingin at standa í hesum løgna glas- og spegilsrúminum er bæði djúpt hugtakandi og rættiliga órógvandi. Tú kennir, at tú ikki heilt hevur fast undir fótum, tí gólvið speglar rúmið og teg sjálvan í eini endaleysari røð av endurtøkum, sum hvørva perspektivistkt í dypdini eins og í einum botnleysum tunnli.

– Uppi yvir høvdinum er eftir øllum at døma heldur onki loft, tí lofti er eisini ein endaleysur »tunnil« av speglingum uppeftir. Tú eins og sveimar frítt í eini elaevatorskakt - mitt millum himmal og helviti, um eg so má siga.

– Glasmálningarnir á síðuveggunum eru eitt marglitt spæl av abstraktum skapum, sum verða gjøgnumlýst útifrá og ger kensluna av at sveima í vektloysi í einum kosmiskum rúmi enn sterkari. At ganga inn í verkinum kennist sum nakað, ið ikki ber til, næstan sum at ganga á vatni.

– Upplivingin er so veruleikakend, at fólk við sterkum fobiium, verða rádd frá at fara inn í verki: Tey risikera at uppliva tað sum eina ørandi marru!